## Færri íslendingar

Fyri fyrstu ferð í meiri enn eina øld minkaði fólkatalið í Íslandi í fjør. Tann 1. januar í 2010 búðu 317.630 fólk í Íslandi samanborið við 319.368 eitt ár frammanundan. Sostatt minkaði fólkatalið eitt hálvt prosent í fjør, og tað skal samanberast við, at undanfarin fimm ár hækkaði tað 1,6 prosent í meðal um árið, skrivar Morgunblaðið. Hagstovan í Reykjavík sigur, at fólkatalið minkaði í øllum pørtum av landinum í fjør, men at største minkingin var á Eysturlandinum og Vesturlandinum.



## Ófriður í Jerusalem

Fleiri hundrað palestinar gingu í morgun mótmælisgongu í tí gamla býarapartinum í Jerusalem, har tey mótmæltu ísraelsku avgerðini at byggja 1600 íbúðir afturat í Eystur-Jerusalem. Ísraelska løgreglan legði uppí og spjaddi mótmælisgonguna. Teir seinastu dagarnar hava fleiri samanbrestir verið millum løgregluna og palestinar, sum eru í øðini um ísraelsku byggiætlanina. Bæði ST, USA, ES og Russland hava eisini mótmælt ætlanini, men Ísrael tykist ikki hava hug at slaka, skrivar AFP.



*Gongst sum Annika Olsen vil, verður ein endalig loysn á umstrídda vegnum ígjøgnum Leirvík, funnin í ár*

# Umhugsar at biðja um meiri pening til Leirvík

**Annika Olsen vil hava eina skjóta loysn á vegaføringini ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin**

NORÐOYATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg miði eftir at hava eina loysn á máinum um vegaføringina ígjøgnum Leirvík í ár.

Tað staðfestir Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum.

Enn er ongin niðurstøða í málinum um illa umstrídda vegin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin.

Men nú fer Annika Olsen at leggja málið um vegaføringina ígjøgnum Leirvík fyri á næsta landsstýrisfundi.

Hetta er eisini eitt krav frá býráðnum í Eysturkommunu, sum nú hevur mist tolið og hevur sett hart ímóti hørðum.

Tað endaði við, at býráðið herfyri brádliga samtykti at íbindingarloyvið verður ikki longt og at vegurin beinanvegin skal gravast upp, sáast við grasi og lendið handast kommununi aftur í sama standi, sum tað á sinni varð latið til vegin.

Hetta hevur býráðið gjørt fyri at framprovokera eina avgerð í politisku skipanini.

Men borgarstjórin staðfesti eisini, at tey vórðu sinnað at geva samgonguni stundir at koma við einum útspæli.

### Loysn í ár

Og tað útspæli kemur væntandi eftir næsta landsstýrisfund, sum ikki er endaliga ásettur enn.

Annika Olsen hevur gjørt eitt upprit til landsstýrið um vegaføringina, men hon vil ikki siga, hvat stendur í tí, fyrrenn tað er lagt fyri landsstýrið.

Men í øllum førum kann hon siga, at hon mælir til, at málið verður loyst í ár.

Og tað er ikki óhugsandi, at hon fer at biðja um eykajáttan til endamálið.

Hetta sigur hon, hóast umboð fyri samgonguna meiri enn einaferð hava gjørt greitt, at eykajáttan verður ikki latin til íløgur í ár.

Trupulleikin er, at játtanin upp á 40 milliónir, sum Løgtingið hevur sett av til vegaføringina ígjøgnum Leirvík, røkkur ikki, tí arbeiðið er mett at kosta 50 milliónir.

Tí er neyðugt við meiri pengum, men tað hevur Løgtingið ikki viljað játtað.

Annars heldur landsstýriskvinnan, at vegurin ígjøgnum Leirvík er eitt serstakt mál, tí hon metir tað, sum eina verkætlan, ið er ígongd.

- Hetta er sostatt ikki talan um eina nýggja verkætlan og tí eigur hon at verða gjørd liðug, sigur Annika Olsen.

Hinvegin hevur Annika Olsen eisini boðað frá, at hon er í samskifti við arbeiðstakaran um at fáa prísin niður.

- Eg helt, at vit vóru í einum góðum samskifti um at fáa prísin niður og tí kom tað óvart á meg, at býráðið brádliga reageraði so harðliga.

Hon vil ikki siga, hvat hendir, vissi Kommunan ger álvara av málinum við teirri avleiðing, at Norðoyatunnilin verður stongdur

- Tað taki eg upp, skuldi tað komið so langt, at vegurin verður grivin av. Men eg haldi, at ognartøka er eitt øgiliga stórt inntriv, so tað verður ikki tað, vit fara eftir við tað fyrsta, sigur landsstýriskvinnan.

- Tað er ikki mátin at samskifta upp á í einum fólkaræði, leggur landsstýriskvinnan afturat.

# Vildu ikki bíða í tvær vikur

**Løgtingið hevur nú endaliga samtykt ætlanin at byggja flogvøllin í Vágum út, hóast tað eru bara tvær vikur til ein kanning fyriliggur sum vísir, hvar í Føroyum ein flogvøllur liggur best**

FLOGVØLLURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Løgtingið hevur í morgum endaliga avgreitt málið um at byggja flogvøllin í Vágum út á 1799 metrar.

Útbyggingin varð einmælt samtykt og kostar 365 milliónir.

Hetta hendir hóast tað bara eru tvær vikur til úrslitið fyriliggur av eini kanning sum vísir, hvar í Føroyum, tað er best at leggja ein flogvøll.

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sigur nevniliga, at seinni í hesum mánaðinum er úrslitið nevniliga klárt av eini stórari kanning sum hevur til endamáls at vita, hvar í Føroyum, tað er best at leggja ein flogvøll.

Í fleiri ár eru veðurmátingar gjørdar á Glyvursnesi og í Søltuvík fyri at kanna floglíkindini á hesum støðunum.

Hendan seinasta tíðin er brúkt upp á at greina upplýsingarnir, sum eru fingnir til útvega í hesum mátingunum.

- Endamálið við kanningini er at vita, hvar ein flogvøllur liggur best, tá ið hugsað verður vind, turbulens, sýni og regularitet, sigur stjórin á Landsverki.

Og arbeiðið er nú komið so langt, at í seinasta lagi um tvær vikur fáa vit greiði á, hvussu floglíkindini eru á Glyvursnesi og í Søltuvík aftur ímóti í Vágum, sigur stjórin á landsverki.

Einstakir politikarar hava annars fýlst á, at Løgtingið tekur endaliga avgerð um at byggja flogvøllin í Vágum út fyri fleiri hundrað milliónir, áðrenn vit vita, hvar ein framtíðarflogvøllur liggur best.

Vit spurdu Oyvind Brimnes um hann heldur at tað er samfelagsliga rætt, at politiski myndugleikin tekur eina so stóra avgerð, tá ið vit um bara tvær vikur fáa at vita, hvar tað er best at gera íløgur í ein framtíðar flogvøll.

Men tað vil hann ikki svara upp á, tí hann sigur, at tað er ein politiskur spurningur.

Nakrir fáir politikarar hava verið ivingarsamir um útbyggingina, serliga John Johannessen og Poul Michelsen. Eitt nú hava teir víst á, at tað er rætt at bíða eftir kanningini, sum Landsverk fer at almannakunngera um tvær vikur.

Men teir stúra eisini fyri, at verða 365 milliónir brúktar til at byggja vøllin í Vágum út fyri, fer at tað skjóta allar ætlanir um ein framtíðartryggjaðan flogvøll eini 25-35 ár fram í tíðina.